


# Grannskoðari

*Grannskoðan • Roknskap • Bókhald • MVG • Skat • Ráðgeving*

Vegna vaksandi virksemi søkir Roknskaparfelagið eftir einum ungum dugnaligum og fryntligum grannskoðara, sum hevur sum mál at gerast skrásettur grannskoðari.

STARVIÐ
Arbeiðið fevnir um bókhald, roknskap og grannskoðan og eina røð av øðrum uppgávum, ið hava tilknýti til hetta arbeiði.

Tú hevur HH-prógv ella aðra líknandi útbúgving. Samstundis er tú tilreiðar at fara ella ert farin undir HD-útbúgving í roknskapi og føroyskum skattarætti 1 og 2. Tær neyðugu minst 3 ára starvsroyndirnar fært tú hjá okkum. Eftir at hesar útbúgvingar eru loknar, er møguleiki um at søkja um at gerast skrásettur grannskoðari.

Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

VIT BJÓÐA
Vit bjóða eitt fjølbroytt, avbjóðandi og spennandi starv við møguleika fyri persónligari og yrkisligari menning. Vit stuðla útbúgvingini við at gjalda fyri luttøkugjald, bøkur o.a. Løn eftir nærri avtalu, sum hækkar stigvíst við ávegisútbúgving og starvsroyndum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Olaf Frits Joensen á tlf. 309400 ella um teldupost olaf@roknskap.fo. Starvið verður sett eftir nærri avtalu.

Umsóknir til starvið skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 21. juni 2007 og skulu sendast til:

**Roknskaparfelagið spf.**
J. C. Svabosgøtu 48
Postboks 2210
FO-110 Tórshavn

ella til teldupost roknskap@roknskap.fo

Roknskaparfelagið Sp/f er ein fyritøka, sum hevur til endamáls at veita dygdargóðar tænastur í samband við grannskoðan, roknskap, bókhald, mvg, skatt og ráðgeving. Vit leggja stóran dent á yrkisliga dygd og tætt samskifti við kundan.

Vit veita í dag tænastu til eitt rættiliga stórt tal av kundum, sum hava áhugamál bæði í Føroyum og uttanlands. Millum kundarnar eru P/f, Sp/f , Í/f, firma, yrkisfeløg, ítróttafeløg, limafeløg, einstaklingar o.o.

Fyri einum góðum ári síðan flutti skrivstovan í egin høli í J. C. Svabosgøtu 48 í Tórshavn.





**Kunningarstovurnar kring landið**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | Tel. | 302425 | Klaksvík | Tel. | 456939 | Tvøroyri | Tel. | 372480 | Skopun | Tel | 361704 |
| Fuglafjørður | Tel. | 444860 | Vágar | Tel. | 333455 | Vágur | Tel. | 374342 | Vestmanna | Tel | 471500 |
| Runavík | Tel. | 417060 | Sandoy | Tel. | 361836 | Nólsoy | Tel | 327060 | | | |





**Løvubetong**

Løvubetong veitir dygdargott
sement og betong um alt landið.



Løvubetong · Flatnavegur 8 · 460 Norðskáli · Tel 58 68 00